# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/08 - 31. mars 2022 17:30-19:00

### Skrá:

| | |
|---|---|
| 1 | 8. frívikan sum vetrarferiu heldur enn summarferiu. Ynski frá foreldraumboðunum. |
| 2. | Rørsla: Orða ætlanir og politikkir, so rørsla verður flættað inn í virksemi skúlans. |
| 3. | Reaktión frá foreldrum hjá næm. í 9. fl. til tiltak í NLH. |
| 4. | Telefonpolitikkur |
| 5. | Ymiskt. |
| 6. | Áseta næsta fund. |

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Ruth, Erla, Sjúrður & Derhard |
| Forfall: | Bjørg, Snorri |
| Gestir: | Eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**8. frívikan sum vetrarferiu heldur enn summarferiu. Ynski frá foreldraumboðunum.**
Foreldraumboðini ynskja at kanna møguleikan fyri at seta í verk vetrarfrí.
Foreldraumboðini venda sær til foreldraráðið at kanna um hetta er eitt breitt ynski.
Leiðslan vendir sær til starvsfólkini fyri at kanna barometrið millum starvsfólkini.
Um tað er ein stórur meiriluti fyri, sendir skúlastýrið eina umsókn um at broyta viku 32 til arbeiðsviku og viku 7 til feriuviku.

Ad.2
**Rørsla: Orða ætlanir og politikkir, so rørsla verður flættað inn í virksemi skúlans**
Skúlastýrið heitir á Snorra um at hava eitt upplegg á 30 min um evnið til næsta stýrisfund. Uppleggið skal verða grundarlag undir ætlanini at orða politikkir fyri rørslu í skúlatíð.

Ad.3
**Reaktión frá foreldrum hjá næm. í 9. fl. til tiltak í NLH.**
Skúlin heldur fram við somu kós, har tað stendur lærarum frítt at melda flokkar til tiltøk, ið eru partur ella kunnu verða partur av undrivísingartilfarinum. Men tað er samstundis skúlans skylda at upplýsa foreldur um tiltøkini, so tey kunnu velja tiltøkini frá, um tað er teirra ynski.
Skúlastýrið heitir á leiðsluna um at hava greiða kunning um innihaldi á tiltøkum, ið kunnu verða stoytandi á flokssíðunum um slík tiltøk í góðari tíð.

Ad.4
**Telefonpolitikkur**
Skúlastýrið er samt um at halda fast við verandi politikk !

Ad.5
**Ymiskt**
Lkh

Ad.6
**Áseta næsta fund**